gult cyan magenta svart



# Stórfingin sølustevna

*Ítróttarhøllin í Runavík ver›ur í vikuskiftinum karmur um stórfingnu sølustevnuna Marko ´2000, sum Nes Sóknar Ítróttarfelag skipar fyri*



Ítróttarhøllin í Runavík ver›ur á tremur vi› frams‡narum og vørum, tá sølusevnan Marko ´2000 letur upp fríggjadagin kl. 17.00. NSÍ hevur á›ur roynt seg sum fyrireikari og fyriskipari av slíkum sølustevnum, vi› misjøvnum úrslitum. Men hesafer› er líkt til, at ta› fer at ganga heilt væl.

Fyrireikararnir vita sjálvsagt ikki hvussu mong vitjandi fara at koma til stevnuna, men teir vita, at ítróttarhøllin í Runavík er á tremur vi› frams‡narum og vørum. Áhugin at ver›a vi› á stevnuni hevur veri› rættuliga stórur. Og ta› sæst eisini aftur í høllini. Alt plássi› í høllini er útnytta› til fulnar, til tess at fáa pláss fyri øllum. Tá hava fyrireikararnir enntá avgjørt, at allir persón- og lastbilar, sum skulu s‡nast fram, skulu standa uttanfyri høllina.

Út frá stóru undirtøkuni ímillum handlarnar og fyritøkurnar í landinum, eru fyritreytirnar fyri eini gó›ari og fjølbroyttari sølustevnuni til sta›ar. Tí vænta og vóna fyrireikararnir, at áhugin at vitja stevnuna ver›ur rættuliga stórur.

– Fólki dámar og hevur hug at ganga ímillum básarnar á eini sølustevnu, har úrvali› av vørum er eins stórt sum í einum vøruhúsi›.

## 30 s‡na fram

Ta› ver›a allar hugsandi vørur og tænastur at finna á sølustevnuni Marko ´2000 í Runavík – bæ›i stórt sum smátt. 30 frams‡narar eru vi› á stevnuni, og teir fáast vi› so fjølbroyttar vørur sum innbúgv, gávulutir, fløgur, bilar, fiskiambo›, bátaframlei›slu, piercing og mangt mangt anna›. So til øll tykkum, sum dáma at ganga í handlum – antin fyri at keypa, ella bert fyri at hyggja – so er sølustevnan Marko ´2000 júst rætta sta›i› at fara. Alskyns klædnapløgg – føroysk sum útlendsk – ver›a at fáa til keyps. Sum á flesum ø›rum sølustevnum ver›a eisini bilar vi› í Runavík. Brø›ur Petersen bilar og Esmar Simonsen, sum selur Daewoo, eru vi› á stevnuni, og n‡ggjastu modellini hjá teimum ver›a s‡nd fram á stevnuni.

Annars eru allar hugsandi vørur og fyritøkur vi›, og fólk hava trygd fyri, at ta› ver›ur nóg miki› at hyggja eftir allar dagarnar.

Umframt sjálvar s‡ningarnar á básunum er eisini nógv gott og fjølbroytt undirhald á pallinum leygar- og sunnudagin.

## Fer› til Sveits at vinna

Stevnan letur upp fríggjadagin kl. 17.00, og er hon opin til kl. 22.00.

Leygardagin ver›a dyrnar latnar upp kl. 14.00, og eftir mótas‡ningar og undirhald á pallinum hvønn heilan tíma, letur sølustevnan aftur kl. 22.00.

Sunnudagin er seinasti stevnudagurin, og tá ver›ur eisini lati› upp kl. 15.00. Sunnudagin er aftur mótas‡ningar og undirhald á pallinum hvønn heilan tíma, umframt alt anna›, sum hendir á stevnuni.

10 minuttir á›renn stevnan endarm ver›ur drigi› millum atgongumerkini, sum eru seld sunnudagin, og eftir hetta, ver›ur drigi› ímillum øll atgongumerkini, og fleiri vinningar eru at vinna. Høvu›svinningurin er ein fer› til Sveits til landsdystin ímillum Sveits-Føroyar. Les meir um skránna og høvu›svinningin a›rasta›ni í bla›num.

Stevnan endar kl. 22.00 sunnudagin.

MARKO´2000
SØLUSTEVNAN
Verður í ítróttarhøllini í Runavík 29. sept. - 01. okt.
Skrá og undirhald

**Fríggjadagur 29. september**
Kl. 17.00 Marko ´2000 letur upp
Kl. 20.00 Mótasýning á pallinum
Kl. 22.00 Marko ´2000 letur aftur

**Leygardagur 30. september**
Kl. 14.00 Marko ´2000 letur upp
Kl. 15.00 Marko ´2000 verður sett
Kl. 16.00 Mótasýning á pallinum
Kl. 17.00 Sámal Ravnsfjall *Trubadurur á munnharpu og gittara*
Kl. 18.00 Magni Christiansen *Country- og gospeltónleikur*
Kl. 19.00 Eivør Pállsdóttir *Syngur sangir av nýggju fløguni*
Kl. 20.00 Mótasýning á pallinum
Kl. 21.50 Drigið verður millum seldu atgongumerki hendan dagin og seld atgongumerki fríggjadagin
Kl. 22.00 Marko ´2000 letur aftur

**Sunnudagur 01. oktober**
Kl. 15.00 Marko ´2000 letur upp
Kl. 16.00 Mótasýning á pallinum
Kl. 17.00 Niels Midjord Live
Kl. 18.00 Vísumenn úr Klaksvík *Skemtivísur við m.a. Hans Hjalta Skaale og øðrum*
Kl. 19.00 Rúna og Ronnie *Rúna á Heygum og Ronnie Nielsen syngja og spæla*
Kl. 20.00 Gallasýning við mótasýning og undirhaldi
Kl. 21.50 Drigið verður millum seld atgongumerki hendan dagin, og seldu atgongumerkini fyri allar dagarnar. *Høvuðsvinningurin er ein ferð til Sveits við 12. Manni til landsdystin ímillum Sveits-Føroyar 07. oktober*
Kl. 22.00 Marko '2000 letur aftur Formaðurin hjá NSÍ endar stevnuna







Magni Poulsen er frásøgumaður í samband við mótasýningarnar









